

# Frálandavinnan stóra útbygging í Esbjerg

Jan Müller

16.02.2014 - 11:00

Oljan.fo

Fleiri feløg í frálandavinnuni eru í ferð við at byggja sær høvuðssæti í Esbjerg. Vesturjútska havnin, sum fyrr var tann størsta fiskivinnuhavnin í Danmark, er í hesum døgum sum eitt stórt byggipláss, og tilsamans er talan um bygging fyri meiri enn eina milliard krónur, skrivar Jydske Vestkysten.

Tom L. Nielsen, stjóri í Esbjerg Erhvervsudvikling, sigur við blaðið, at Esbjerg hevur í mong ár arbeitt fyri at fáa nýggjar fyritøkur til býin, og at tað eru fleiri, sum hava fingið eygað á teir stóru møguleikarnar á orkumarknaðinum, sum Norðsjógvurin er ein týðandi partur av.

-Í fjør fingu vit 25 nýggjar fyritøkur í býnum, og tað er met. Eg haldi, at tann ofta umrøddi tøppurin er farin av ketsjupfløskuni, sigur Tom L. Nielsen.

Millum frálandafeløgini, sum byggja í Esbjerg, kunnu nevnast Semco Maritime, Maersk Olie & Gas, Esvagt og Halliburton. Hjá Maersk Olie & Gas er talan um ein næstan 10.000 fermetrar stóran bygning, sum skal hýsa meiri enn 600 starvsfólkum, og sum verður liðugur næsta ár. Hjá Esvagt, sum hevur nógvar føroyinmgar í arbeiði, er talan um eitt nýtt høvuðssæti til 65 starvsfólk.

-Tað, sum hendir í Esbjerg í hesum døgum, er ein staðfesting av, at landafrøðiliga liggur Esbjerg sera væl fyri, tá tað snýr seg um olju, gass og havvindmyllur. Men gongdin er eisini eitt úrslit av, at býurin hevur havt visiónir og ta røttu strategiina, sigur Jacob Pedersen, greinari hjá Sydbank, við Jydske Vestkysten